# Hittir foreldrini fyrstu ferð

**Ættleiddi Rúni Kim Petersen ella Hyo Shik, sum koreansku foreldrini nevna hann, fer nú til Seoul at hitta biologisku foreldrini, sum settu seg í samband við hann fyri meira enn hálvum øðrum ári síðani**



*Tað er heldur sjáldsamt, at foreldur seta seg í samband við barnið, sum tey hava ættleitt burtur. Tað hendir fyri 100 út av 4000 ættleidd, siga tey í Korea Klubben. Hóast at tað hevur verið stuttligt at skriva saman við biologisku familjuni, verður tað nakað heilt annað at hitta tey, sigur Rúni Kim Petersen*

ÆTTLEIÐING
*Marjun Dalsgaard*

Tað eru ikki sørt av summarfuglum í búkinum hjá 26 ára gamla Rúna Kim Petersen. Hann er ættleiddur, og dagurin nærkast, har hann fyri fyrstu ferð skal hitta biologisku foreldrini í Seoul í Suður Korea.

Hesin partur av hansara søgu byrjaði í mars í 2002, tann dagin hann fekk bræv frá Adoptiónskontórinum í Århus um, at biologisku foreldrini vildu hava samband við hann. Sosialurin gjørdi eitt prát við hann tá, og síðani eru fleiri brøv og

**- Tað ringasta, eg kann ímynda mær, er, at vit einki hava at tosa um, og at tað virkar meiningsleyst at vera har.**

myndir send ímillum londini. At síggja myndir av biologisku familjuni hevur verið løgið, heldur Rúni. Hesi fremmandu fólk, sum siga seg vera hansara kjøt og blóð. Enn løgnari heldur hann tað vera at síggja seg sjálvan í bæði mammuni og teimum báðum brøðrunum, ikki bert í útsjónd, men eisini í yrki. Familjan í Seoul eigur eina matstovu, og Rúni er bæði kokkur og tænari.

- Súreplið er kanska ikki dottið so langt frá træðnum, flennir hann. Tá tey skriva til hansara, kalla foreldrini í Seoul hann fyri Hyo Shik.

### Broytti lív hansara

Tá ið Rúni hoyrdi frá biologisku foreldrunum fyrstu ferð, kollveltist tilvera hansara, og lívið hevur ikki verið tað sama síðan – tað er ríkari nú, sigur hann. Hóast tað hevur verið stuttligt at skriva saman við teimum, verður tað kortini nakað heilt annað at hitta tey.

- Tað tómrúmið, sum tú kann kenna, tá tú ert ættleiddur, fer ikki vekk, fyrr enn tú hevur hitt familjuna. Tað er ikki fyrr enn tá, at tú veruliga kennir røtur tínar, sigur hann.

Rúni er sera spentur, men onkuntíð vil hann bara hava tað yvirstaðið.

- Tað er nógv stuttligari hjá mammu og teimum, tey eru so øgiliga forvitin. Tey hava altíð kent meg, og nú sleppa tey so at síggja biologisku foreldur míni – so tey bara gleða seg. Tað stendur meira á hjá mær, sigur Rúni.

- Eg hevði bara viljað, at eg var komin heim aftur og visti, um vit svinga væl saman, sigur Rúni. Hann

**- Tað tómrúmið, sum tú kann kenna, tá tú ert ættleiddur, fer ikki vekk, fyrr enn tú hevur hitt familjuna. Tað er ikki fyrr enn tá, at tú veruliga kennur røtur tínar.**

heldur, at tað er hart at bíða - nógvar vónir, men enn kann hann ikki vita, hvussu tað heila fer at spæla av. Tí hevur hann valt ikki at vænta sær alt ov nógv.

- Tá eg havi hitt tey, veit eg, um eg fari at brúka tíð og orku upp á hetta sambandið. Tað merkir ikki, at eg kvetti sambandið, um alt ikki gongur sum eftir ánni beinanvegin, men eg fari ikki at berjast fyri tí, um eg ikki verði lukkuligur av tí. Møguliga havi eg einki felags við tey, tey liva jú heilt øðrvísi enn vit, og tað kann vera, at kemiin ikki riggar, sigur Rúni.

- Í besta føri rokni eg við, at vit verða vinir fyri lívið, og at eg vitji tey av og á, leggur hann aftrat.

### Hevði ikki farið einsamallur

Bæði mamman, pápin, systirin og ein beiggi fara við Rúna til Korea. Hann hevði ikki farið, um hann skuldi avstað einsamallur.

- Tað kann sjálvsagt hugsast, at stemningurin verður eitt sindur undarligur ella spentur, tí báðar familjurnar vera har – møguliga tey í Korea hava eigarafornemmilsir ella okkurt sovorðið, men eg vil hava, at báðar familjurnar eru hjá, sigur Rúni.

- Eg vil gjarna hava "backup". Tey eru fleiri og eru jú sum ein familja, so eg vil eisini hava mína familju við. Tað gevur meiri javnvág. Um eg til dømis verði keddur, havi eg

**- Tað kann sjálvsagt hugsast, at stemningurin verður eitt sindur undarligur, tí báðar familjurnar vera har – møguliga tey í Korea hava eigarafornemmilsir ella okkurt sovorðið, men eg vil hava, at báðar familjurnar eru við.**

mína familju har, og so kenni eg meg ikki so einsamallan, og kann hugsa, at tað ger ikki so nógv, um tað ikki gongur sum ætlað, sigur Rúni.

- Tað ringasta, eg kann ímynda mær, er, at vit einki hava at tosa um, og tað virkar meingingsleyst at vera har, sigur hann.

### Korea Klubben skipar fyri

Fyrstu ferð Rúni hittir familjuna í Korea verður 11. august klokkan 10 – morgunin eftir, at hann er komin til Seoul. Ferðin er skipað av Korea Klubben og einum hollendskum ferðaleiðara, ið sjálvur er ættleiddur úr Korea. Hann hevur ferðir til Korea fyri ættleidd sum sergrein.

Hesin ferðaleiðari kennir alt til Korea og skilir eisini koreanskt. Hann hevur lagt alt til rættis – eisini sett seg í samband við familjuna og avtalað nær og hvar tey skulu hitta Rúna. Tað er ein lætti, at ein triðji persónur tekur sær av tílíkum, heldur Rúni. Misskiljingar kunnu lættliga koma fyri og óneyðugir trupulleikar standast av tí.

Umframt ferðaleiðaran, familjuna hjá Rúna og biologisku familjuna úr Korea verður eisini ein annar tolkur fyri hann. Tískil vera tey 10 fólk, ið hittast, tá Rúni sær síni biologisku foreldur fyrstu ferð.

- Tað kann virka eitt sindur ógvusligt, at standa har 10 fólk, men eg haldi, at tað er betur soleiðis, sigur Rúni.

Tá tey øll hava heilsað upp á hvønn annan, kann hann velja at vera einsamallur við koreansku familjuni, um hann hevur hug til tað. Tað veldst um, hvat hann hevur hug til tá, sigur Rúni.

Umframt at vera í Seoul er ætlanin at ferðast runt í Korea og fara heim aftur 23. august. Tað er tó møguligt, at hann verður har longur, sigur Rúni.

Sosialurin ynskir Rúna og familjuni eina góða ferð!

**- Tá eg havi hitt tey, veit eg, um eg fari at brúka tíð og orku upp á hetta sambandið. Tað merkir ikki, at eg kvetti sambandið, um alt ikki gongur sum eftir ánni beinanvegin, men eg fari ikki at berjast fyri tí, um eg ikki verði lukkuligur av tí.**



**VIÐMERKINGAR**

# Viðvíkjandi skúlabókaútgávu

**Ein síðsta viðmerking á hesum sinni til Jonhard Mikkelsen, blaðstjóra**

**Heðin M. Klein**
*dagligur leiðari í Føroya Skúlabókagrunni*



At skifta orð við hampafólk um umráðandi evni og stríðsmál kann vera bæði áhugavert og gagnligt, sjálvt um tú kanska ert grundleggjandi ósamdur við tann ella tey, sum tú eigur orð saman við. Sjónarmiðini kunnu roynast, brótast og brýnast. Men ein avgerandi fyritreyt og eitt minstakrav má vera, at viðgerðin fer fram á einum rímiliga reellum grundarlagi, millum annað við røttum faktiskum tølum.

Hesa grundleggjandi fyritreyt fyri einum konstruktivum orðaskifti lýkur Jonhard Mikkelsen tíverri ikki. Og tá ið hann nú endurtekur sínar snaringar og skeivleikar, so er so lítið hjá mær at gera - ja hann leggur longu í vaðið í tí allar fyrsta setninginum: "Skúlabókagrunnurin fær stívliga 6 milliónir krónur í stuðli." (Tað rætta talið er 5,2 milliónir í 2002 og 4,8 milliónir krónur í 2003). Og hetta sama, har sum tøl í milljónaklassanum koma skeivt fyri, heldur hann so á við í hesi seinnu greinini í Dimmalætting og Sosialinum - viðvíkjandi Bókamiðsøluni, sum hann játtanarliga heingir um hálsin á Bókadeildini hjá Føroya Lærarafelag og Skúlabókagrunninum, viðvíkjandi stuðulskontuni í Mentamálaráðnum m.a. hjá privatum forløgum til at geva út skúlabøkur fyri (prátið um kappingaravlagandi stuðul er heilt burturvið), viðvíkjandi útgávusíðutalinum hjá Føroya Skúlabókagrunni, sum er framvegis skeivt roknað hjá honum, viðvíkjandi stuðli pr. útgávu og/ella stuðli pr. blaðsíðu. Osfr., osfr.

Jonhard Mikkelsen tykist ikki at duga at skilja - ella hann vil ikki skilja - at tølini, eg nevni í rættleiðing mínari, eru ikki relativistisk gummitøl, men absolutt veruleikatøl!

Eitt, ið Jonhard Mikkelsen fer ov lættliga um, eru krøv til undirvísingarmiðlar. Hetta avgerandi evnið í hesum samanhanginum krevur eina djúpari og nógv meira umfatandi viðgerð enn tað, sum møguligt er á hesum staði. Tí hetta er aðaltátturin í teirri skúlabókagerð, ið tekur sítt arbeiði í fullum álvara, og hetta er tað, sum ger, at undirvísingarmiðlaútgáva er nógv øðrvísi og torførari - og eigur at vera øðrvísi, torførari, drúgvari og tí upp á seg dýrari - enn øll onnur útgáva, sum eg veit um at siga.

*Langevåg í Noregi, 10. juli 2003.*

# Summartíð er frítíð

TRYGGING
*Tíðindaskriv frá Trygd*

Nú er summartíð, og hjá nógvum somuleiðis tann árliga ferðingin. Ein túrur sum tú hevur sæð fram ímóti og longst eftir í fleiri mánaðir, og sum helst skuldi givið tær góð minni. Men tað sum skuldi ganga so væl, kann skjótt verða vent til eina marru, um tú ikki ert nóg væl fyrireikað/ur.

**Eru tínar tryggingar í lagi?**
Tað er eins umráðandi at eftirkanna tryggingarnar, sum bilin, áðrenn tú fert at halda frí uttanlands, og eigur tú at hava nevndu tryggingar í lagi, áðrenn farið verður avstað.

**Familjutryggingin**
Familjutryggingin hjá Trygd fevnir um eina ferðagóðstrygging og eina ábyrgdartrygging.

Ferðagóðstryggingin fevnir um teir lutir, sum tú tekur við tær á ferðini, tað verði seg klæði, myndatól og í ein ávísan mun reiður peningur. Ábyrgdartryggingin fevnir um sjálvan teg, um tú gert skaða á aðrar persónar ella lutir hjá øðrum á túrinum. Familjutryggingin tryggjar teg væl, men tú hevur ikki fulna, um tú gerst sjúk/ur og hevur hjálp fyri neyðini uttanlands. Tað ger ferðatryggingin harafturímóti.

**Ferðatrygging**
Sum kanska mest týdningarmikla, fevnir ferðatryggingin um útreiðslur í sambandi við lækna, tannlækna, sjúkrahús og harumframt heiluvág í sambandi við sjúku.

Hetta kanst tú ikki vera fyriuttan. T.d. kunnu útreiðslur í sambandi við eitt vanligt beinbrot sunnanfyri, lættliga koma upp á tær 50.000 kr. Tað skalt tú sjálv/ur rinda fyri, um tú ikki ert tryggjað/ur. Undantikið er Skandinavia og partur av Englandi, har tú ikki sjálv/ur rindar fyri útreiðsur til lækna og sjúkrahús.

Ferðatryggingin fevnir harumframt um útreiðslur fyri tíni nærmastu, soleiðis at tey kunnu koma til tín, eins og tú og tey tú ferðast saman við, kunnu verða flutt heim, um onkur gerst álvarsliga sjúk/ur. Gerst onkur av tínum nærmastu álvarsliga sjúkur ella doyr, tá tú ert burtur, rindar tryggingin heimferðina alt fyri eitt. Verður ferðin avbrotin orsaka av sjúku ella orsaka av, at tú verður kallað/ur heim, er møguleiki fyri at tú kanst fáa endurrindað eina nýggja ferð. Eisini fevnir ferðatryggingin um vanlukkutrygging.

Ferðatryggingin kann verða teknað sum ískoyti til familjutryggingina ella sum einsæris ferðatrygging, sum fevnir um ávísa ferð.

**Biltrygging – Tað grøna kortið**
Fara tit at ferðast við bili, eigur biltryggingin sjálvsagt at vera í lagi. Ábyrgdartryggingin er lógarásett, og tað grøna kortið er skjalprógv fyri, at bilurin er ábyrgdartryggjaður og samstundis prógv fyri, at ábyrgdartryggingin hevur endurgjaldsábyrgd mótvegis øðrum eftir teimum endurgjaldsreglum sum eru galdandi í tí landi, har óhappið er hent.

Í nógvum londum, eitt nú í norðurlondum, er ikki neyðugt at hava tað grøna kortið við sær og er tað vanliga heldur ikki eitt krav í EU londunum, men hetta kann verða gagnligt at hava við sær, serliga í suðurevropa. Í nøkrum londum, serliga í teimum gomlu eysturlondunum, er tað grøna kortið eitt krav. Mynduleikarnir í Litavia og Ruslandi góðtaka ikki tað grøna kortið. Her er neyðugt at tekna eina serstaka ábyrgdartrygging við landamarkið.

Tað grøna kortið er ókeypis og fæst við at venda sær til sítt tryggingarfelag.

**Tað reyða kortið**
Er bilurin skrokktryggjaður, hevur tú samstundis ein serligan uttanlandsfulna. Tað reyða kortið er prógv fyri hesum og gevur tær rætt til hjálp, um bilurin er fyri óhappi. Í hesum føri er Danmark eisini útland. Hjálpin er t.d. sleipan ella hjálp til nærmasta verkstað ella í ringasta føri verður bilurin fluttur heimafur.

Um ferðast verður uttanlands við bili, verður tær viðmælt at hava bilin skrokktryggjaðan og hava tað reyða kortið við tær.

Tað reyða kortið er ókeypis, og fæst við at venda sær til sítt tryggingarfelag.

**Sethúsini**
Er ætlanin at ferðast longur enn bert nakrar fáar dagar, er tað eitt gott hugskot at biðja familju ella grannar halda eyguni við sethúsinum, meðan tú ferðast. Eitt vatnrør kann fara at leka og gera stóran vatnskaða bæði á húsið og innbúgvið, um tú ikki varnast hetta í góðari tíð. Eisini kann streymurin svíkja, soleiðis at maturin í frystiboksini verður spiltur. Aðrir skaðar kunnu eisini henda.

Tað er betri at vera fyrivarin enn eftirsnærin.

Góða summarfrítíð!

# Trygdarlás steðgar sextænastum

**Føroya Tele setur trygdarlás á samrøðurnar til tey londini, sum vanliga bjóða sokallaðar sex-tænastur**

TELE
*Tíðindaskriv*

Síðan 27. mai 2003 hevur Føroya Tele havt trygdarlás á samrøðunum til tey lond, sum vanliga bjóða sextænastur. Tænastan er ein fastnettænasta og fevnir bæði um vanligar uppringingar frá fastnetinum og uppringt internetsamband.

Føroya Tele hevur áður havt fast sperr til ávís telefonnummur í hesum londum, men telefonnummurini verða støðugt broytt, so tað hevur verið sera tíðarkrevjandi at halda við líka. Føroya Tele metir, at trygdarlás er smidligari bæði fyri kundan og Føroya Tele.

Orsøkin til hetta stigið er ikki, at Føroya Tele hevur fingið órímiliga nógvar klagur nú, men er ein ásannan av, at við øktari útbreiðslu av internetinum økist vandin. Við hesi tænastu tryggjar Føroya Tele, at kundin ikki av misgáum tekur síður niður av internetinum fyri prísir, sum eru nógv hægri enn teir, sum annars galda fyri kundarnar hjá Føroya Tele.

Hetta er sum sagt bert eitt lás, so kundin kann framvegis ringja til londini, sum eru umfataði av lásinum. Tað verður gjørt við at trýsta eina kotu inn, áðrenn ringt verður.

Tá ringt verður til eitt av hesum londunum, uttan at kotan verður trýst inn, koma soljóðandi taluboð: Vegna kostnaðarmiklar fjarskiftistænastur er landið, tygum ringja til, umfatað av trygdarlási. Um tygum ynskja at ringja til landið, vinarliga trýstið 1449 áðrenn telefonnummarið.

Kotan, sum í dag er 1449, kann broytast, um Føroya Tele fær illgruna um misnýtslu.

Listin við londum, sum eru umfataði av trygdarlásinum, sæst á www.tele.fo/taenastur/trygdarlás. Hann verður broyttur, so hvørt sum nýggj lond koma afturat ella fara burturav.

# Föroya Bjór stavar Vegrin við G

**Föroya Bjór vil verða sett í samband við tónleik og hevur slept einum »Vegr« pilsnara í sambandi við G! Festivalin**

BRYGGJARÍ
*Tíðindaskriv*

Föroya Bjór hevur skrýtt tað sokallaða veðraølið við eini heilt serligari etikett fyri at hátíðarhalda G-Festival tiltakið. Í sambandi við stóru hátíðina í Gøtu 18. og 19. juli hevur Föroya Bjór slept einari "G! Vegr" pilsnarøl á marknaðin, samstundis sum felagið hevur avgjørt at stuðla tónleikatiltakinum.

Stjórin á Föroya Bjór, Einar Waag, sigur seg rokna við, at etikettin saman við stuðlinum til Tónleikasamtakið Grót, ið stendur fyri G! Festivalini, kemur at virka til at framhaldandi knýta Föroya Bjór navnið at føroyskum tónleiki.

– Vit rokna við, at tey 18 til 30 ára gomlu taka okkara boðskap til sín – og so seta vit stórar vónir til veðrið, sigur Einar Waag.

– Tiltøk sum G! Festivalurin eru við til at menna føroyskan tónleik, og tí vilja vit luttaka, leggur hann afturat.

Etikettin á Vegrinum hevur eitt stórt G! búmerki og eina mynd av Gøtuvík, ið varð tikin av sandinum í fjør, tá G! Festivalurin varð hildin á fyrsta sinni.

At nógv arbeiði verður lagt í at fáa eina væl eydnaðan G! Festival endurspeglast í einum gomlum sitati á baksíðuni á Vegretikettuni frá ongum minni enn Gøtu Tróndi:

»Mangt umskipast á mansins ævi. Ikki var tað so, tá ið eg var ungur, at menn skuldu sita ella liggja góðveðursdagar, teir sum ungir vóru og væl førir.«